# Federer er heimsins besti

Roger Federer er heimsins besti tennisleikari, eftir at hann um vikuskiftið basti Andy Roddick í Wimbledon-finaluni. Sostatt er Rafael Nadal skumpaður av fyrsta plássinum, sum hann annars hevur sitið tungt á seinastu 11 mánaðirnar. Sigurin hjá Federer var hansara 15. grand slam, sum merkir, at hann nú er tann tennisleikarin, ið hevur flest grand slam sigrar. Pete Sampras átti gamla metið við 14. grand slam sigrum.



# Serena basti Venus

Í Wimbledon-finaluni hjá kvinnum sigraði Serene Williams á systrini Venus. Fyrsta sett var javnt og endaði 7-6, men í seinna settið vann Serena sannførandi 6-2. Sigurin í finaluni var eisini eyka søtur í so máta, at Serene nú er omaná í innanhýsis uppgerðini systrana millum. Hon hevur nevniliga vunnið 11 av teimum 21 dystunum teirra millum.




# Rush var aftur omaná

Ian Rush bæði vann og skoraði móti Jens Martini Knudsen á Tórsvølli leygarkvøldið. Hann stóð fyri sigursmálinum hjá Liverpool Legends, sum vann 2-1 á Føroyar Legends.

Í undankappingini til HM-endaspælið í 1994 var føroyska landsliðið í bólki saman við Wales, har Rush er ættaður. Tá var framherjin fýra ferðir á blettinum móti Jens Martini Knudsen, sum vardi føroyska málið, í tveimum undankappingardystum. Og leygarkvøldið var hann aftur omaná við sínum fimta máli móti Jens Martini Knudsen.

Henrik Thomsen legði føroyingarnar á odda miðskeiðis í fyrra hálvleiki, men við málum frá John Durnin og Ian Rush eydnaðist tað Liverpool Legends at vinna.

Jón K. Joensen, myndamaður, var á Tórsvølli, og hann hevur tikið myndirnar av dystinum.

- uni









